LM-099/2023

Hagapartarnar í Marknaðtalsbygd 20 Hvalba

Fylgiskjal 11

Hoyringarskriv í samband við " Uppskot til Løgtingslóg um burðardygga ferðavinnu (Ferðavinnulógin)"

Hagapartarnar í marknaðtalsbygd 20 Hvalba (Føroya største marknaðtalsbygd) loyva sær at hava hesar viðmerkingar til lógaruppskotið.

Vit halda at tað er logið at lógin hevur heiti. Løgtingslóg um burðardygga ferðavinnu og undurheitið ferðavinnulógin. Tá ið hendan lógin beinleiðis umtalar hvussu farast skal fram í privatum og festishøgum.

Til § 1. Vit taka fult undir við endamálinum við lógini, at ferðavinna skal skipast burðardygt við serligum atliti at verja náttúru, tilfeingi, siðvenju, mentan og mentanararv. Tó halda vit at tað er sera logið at man ikki vil verja ognar og ræðisrættin ið er friðhalgaður sambært grundlógini og sama at seyðurin og fenaðurin ikki eru beinleiðis nevnd.

Leggjast kann aftur at, at verðandi jarðarlógir eiga at verða varðveittar, tí tær nú sum altíð eru alneyðugar til tess at tryggja skipaði viðurskifti í hagaportum og millum hagapartar.

Til § 2. Vit taka undir við allýsingunum ið lýsa ymisku partarnar júst sum vit skilja teir. Í litra 1 kemur inn fólkið á staðnum "bygdin", hesum taka vit ikki undir við. Tó hava vit tað viðmerking til stk 2 at tað ikki eigur at verða Landsstýrismaðurin ið ger av hvussu allýsingarnar skulu skiljast men antin Føroyarættur ella ein "Landbúnaðar gerðarrættur"

Til §3. Vit taka als ikki undir við hvørsmans rætti. Tað er til eina og hvørja tíð eigarin og festarin av jørðini ið ger av, hvør, hvar og nær, kann farast í hagan. Tó halda vit at Føroyingar eiga at kunna fara í hagan uttan gjald, so leingi hettar ikki er vinnuligt ella at staðkent fólk má við ið tá kann taka ómaksgjald. Sí seinri frágreiðing.

Til §4. Vit taka undir við lýsingunum av hvussu ein kann bera seg at í hogunum, tó við tí viðmerking til stk 2. at ongin eigur at flota/brúka bát á votnum uttan so at hettar frammanundan er avtalað við eigara/festara. Somuleiðis fegnast vit um stk.4 í ásetur at ikki er loyvt at hava hund við í hagan uttan at hettar er í landbrúksorindum.

Til §5. Vit taka undir við stk 1. At ferðavinna ber kann gerast í samráð við eigara/festara vit taka ikki undir við stk 2 ið ásetir standard avtalur ið øll kunnu gera. Hettar er beinleiðis brot á ræðis rættin og somuleiðis stk 3 ið gevur Landsstýrismanninum heimild at gera standardavtalur uttan um ognina.

Til §6. Vit taka undir við at ein langtíðar ferðavinnuætlan eigur at verða gjørd av kommunum og høgunum í kommununum í felag. Har kommunan einans er samskipandi parturin. Tó ikki undir tí fortreyt at øllum er frítt at fara.

Til §7. Vit taka ikki undir við at nøkur serstøk nevnd manna av tilvildarliga valdum fólkum tekur avgerðir um hvussu farast skal fram á privatari ogn og ogn ið festarar varða av. Tó kundi verði skilagott at hvør hagi valdi eitt fólk í eina nevnd ið hevði samskifti við kommununa.

Til §8. Vit taka undir við at allar farleiðir ið vit loyva verða merktar upp eins og bygdagøtur verða merktar upp. Ferðagjaldið kann brúkast til hettar.

Til §9. Vit halda at tað er av stórsta týdningi at vit hava greiðar skilhaldsreglur og at hesar ikki eru standardiseraðar men eru tillagaðar hvønn hagan sær. Kommunan kann verða samskipandi parturin, meðan marknaðtalið er parturin ið ásetur reglurnar.

Til §10. Vit taka undir ongum umstøðum undir við nokrum ið er ein ognartøka og heldur ikki at ein logtingslóg kann trýsta okkara ognar og ræðisrættindahavarar so nógv at vit verða noyddur at biða landi ognartaka eitt lendi av privatari ella brúks ogn. Umframt at vit als ikki taka undir við at endurgjaldið einans er fevnt av mistum biti ið onki hevur við veruliga virðið at gera. Sjálvandi eiga vit eisini virðið av herligheitunum.

Til §11. Vit taka undir við at trygdin er væl skipað og er hettar ein partur av skilhaldsreglunum hjá hvørjum einstøkum haga eins og ein partur av ferðavinnu ætlanini ið kommunan ið samráð við hagarnar hevur gjort. Vit taka ikki undir við at tað er landsstýrismaðurin ið skal áseta hesar trygdarreglur. Tað má til eina og hvørja tíð verða staðkend fólk ið taka hesar avgerðir.

Onki ókunnugt fólk, tað verðir seg bæði føroying og útlending, at sleppa í vandamikil stoð uttan staðkend fólk. Taka vit feitilendi, hamrar, skorðar og óbygdu oyggjarnar, eitt nú Lítlu Dímun, eigur ongin at fara/sleppa har uttan staðkent fólk ið hagin hevur útnevnt er við.

Til §12. Vit taka sum heild als ikki undir við at tað ikki er loyvt at umsita okkara ogn soleiðis sum vit meta skilabest er. tó kunnu vit taka undir við at ikki er loyvt at taka gjald frá ferðafólkið at ferðast umvegis ávísar bygdargøtur og ikki er loyvt at taka gjald frá Føroyingum ið ferðast í høgunum eftir ásettu reglum um hvar. hvør og nær.

Vit halda eisini at tað vendir fullstendiga skeivt at vit ið eiga og festa jørðina skulu boða frá nær og hvar vit rokja hana. somuleiðis halda vit at tað er undir alt lágmark at vit ikki kunnu skelta soleiðis at vit eitt nú kunnu boða frá leysum tarvi um so er. tí at hettar kann ávirka sálar heilsuna hjá fremmandafólkið.

Til §13. Vit taka undir við at eitt gjald verður kravt frá ferðafólkið og hettar gjald verður brúkt til at bøta um bygdargøtur og skelta við. Allar aðrar gøtur er partur av privatum rakstri og er tað tí upp til hvønn einstakan haga av at gera og halda tær og áseta gjøld eftir tí. Eitt nú kundi hagar eisini søkt um pengar av hesum gjaldið til at skelta. umvælt og byrgt fyri at økið sum eru illa slitin av veðrið ella fólkið verða umvæld.

Til §14. Vit taka ikki undir við býtinum av hesum gjaldi. At kommunan fær til at bøta um bygdargøturnar halda vit er skilagott. Hin partin kundu hagarnar søkt úr. Vit taka als ikki undir við nýggja "stovninum" bygdin.

Til §15. Vit taka ikki undir við at Landstýrismaðurin kann áleggja eigarum/festarum annað enn at hava greiðar reglur um hvussu farast skal fram á ognini.

Til §16. Vit taka undir við at revsing verður ásett sum sekt fyri tann ið brýtur skilhaldsreglurnar ið hvor einstakur hagi og kommuna hava ásett. Men vit halda tó at tað er logið at revsi reglurnar venda meiri móti eigara/festara enn fólkið uttan í frá.

Til §17. Til stk 1. Onga viðmerking. Til stk 2. hava vit tað viðmerking at vit taka als ikki undir við at. §§ 41-42 og § 43. 1. og 4. pkt.. í Lov nr. 171 af 18. maj 1937 for Færoerne om Hegn og Markfred. sum seinast broytt við logtingslóg nr. 30 frá 17. mars 1951. verða tiknar úr gildið. Tó halda vit at § 43. 1. og 4. Pkt. gott kann strikast. Tí fólk hava onki at gera í haganum við hundi uttan so at tað er í samband við landbrúksrokt.

Til §18. Onga viðmerking.

Umframt viðmerkingarnar til einstoku §§ hava vit tað viðmerking at vit taka als ikki undir við at nakar kann lóggeva fullan hvørsmansrætt inn á okkara privatu ogn ella ogn ið vit umsita. Eisini skulu vit siga frá at okkum als ikki dámar almennu orðingina, tey ið varða av jørðini, áleið helvtin av jørðini í Føroyum er Óðalsjørð, ein óðalsmaður varðar ikki av jørðini, hann eigur jørðina.

Sum hettar lógaruppskotið fyri liggur kemur tað at hava vanlukkuligar fylgir fyri okkara jarðarbrúk, djóralív og náttúru. Vit taka tó undir við at okkum verður álagt at boða frá hvørjar reglur og skyldur eru galdandi inni á okkara ogn, umframt at vit góðtaka at ikki er loyvt at taka gjald frá Føroyingum fyri gongd í haga, so leingi hettar ikki er á vinnuligum stoðið, uttan so at staðkend fólk mugu við og tí kunnu taka eitt ómaksgjald.

Vit halda eit viðurskiftini eiga at verða sum tey eru í dag tó við hesum broytingum í verðandi lóggávu;

- ***Ikki er loyvt at taka gjald frá Føroyingum uttan so at hann ferðast vinnuligt ,tó við tí undantakið at um ferðast verður um lendi har í staðkent fólk má verða við, kann krav um samsýning frá Føroyingi krevjast.***
- ***Hagar og kommunur skulu gera eina 2 ára ætlan í inniheldur fylgjandi***

  "opin/partvís opin/stongdur" – "skilhaldsreglur" – "gjald/gjold"
- ***Bygdagotur (tó ikki vandamiklar) er almenn farleið fyri oll (tó við treytum og serligum atlitum)***

Trupulleiki hevur aldrin verði av Føroyingum ið ferðast í hogunum, tað hevur man altíð klára at loyst við pragmatiskari umsiting av verðandi lóggávu.

Vit siggja fram til at verða kallað inn til hoyring og soleiðis at kunna verða við til at fáa eina semju um gongd í haga.

Hagapartarnar í Marknaðtalsbygd 20 Hvalba

Eystan Borg (festi)	*Sandvíkshagin*
Undir Egg (festi)	*Norðan Skarð*
Ùti í Haga uttari partur (festi)	*Eggjarhagi*
Ùti í Haga heimari partur (festi)	*Stórustovuhagin*
Bjalvaskor (festi)	*Fjórðingurin*
Suðuri í Haga Sunnari partur (festi)	*Grímsfjall*
Prestfjall heimari partur (festi)	*Suðuri í Haga heimari partur*
Prestfjall sunnari partur (festi)	*Rókhagi*
Knúkhagi innari partur (festi)	*Knúkhagi uttari partur*
	Hamrhagi innari partur
	Hamrhagi uttari partur

Hettar skriv er undirritað av øllum høgum um marknaðtalsbygd 20, Hvalba.